# Fundur í Hvalbiar sóknar kommunu hin 13. september 2013

Møttir vóru: Trúgvi Gudmundarson, Rúni Thomsen, Eyðfinn Debes, Magni Bertholdsen, Martin í Nesi, Niels J. Thomsen og Jóhan Eli Poulsen.
Formaðurin bað um loyvi at taka tvey mál við aftrat – koma inn sum mál nr. 6 og 7 á skránni.

Fundurin varð settur kl. 17.30.

1. **Umsókn um stuðul við keyp av fløgu hjá Jens Marna Hansen.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

2. **Umsókn um stuðul við keyp av fløgu hjá Flamma.**
   Samtykt varð ikki at stuðla hesum.

3. **Umsókn um stuðul til verkætlan 2013 frá JunifArt.**
   Søkt verður um stuðul á kr. 4.000,- til ferðaútreiðslur v.m. í sambandi við vitjan av fólki frá Vestermølle Museum. Samtykt varð **ikki** at stuðla verkætlanini við fýra atkvøðum ímóti.

4. **Skriv frá borgarum í Sandvík.**
   Samtykt varð at beina málið viðvíkjandi minnisvarðanum í Teknisku nevnd. Samtykt varð at seta fleiri benkur upp komandi vár. Málið viðvíkjandi brandpostinum og vegnum niðan á Garðagøtu verður kannað av Vega- og havnanevndini til komandi fund, meðan Trivnaðarnevndin kannar málið viðvíkjandi Sandvíkar skúla.

5. **Umsókn um marknaumskipan (umbýti/bert uttangarðs) matr. nr. 201a og 243.**
   Søkt verður um loyvi til umbýti/bert uttangarðs millum matr. nr. 201a og 243 - at hesi verða flutt til matr. nr. 244. Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknini.

6. **Umsókn um klípur frá borgara.**
   Samtykt varð einmælt ikki at játta klípur, men grót kann latast við at hann rindar koyringina sjálvur. Um hann ynskir at keypa klípur, er prísurin tann sami sum hjá Landsverk.

7. **Kostnaðarmeting av asfaltering á Hamranesi frá Landsverk.**
   Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Landsverk áljóðandi kr. 275.000,00 uttan MVG.

8. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd:**
   - Skriv viðv. egningarskúrinum í Sandvík.
   - Skriv um gøtuljós á matr. nr. 457.

- Umsókn um graviloyvi á matr. nr. 128n í Fjalstrøðini, Hvalba.

**Vega- og havnanevnd:**

- Skriv frá borgara viðvíkjandi avgerð um asfaltering av túni.

**Trivnaðarnevnd:**

- Skriv frá útiarbeiðandi mammum viðvíkjandi verandi dagrøktarskipan.

**9. Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**

**Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**

- Skriv viðv. egningarskúrinum í Sandvík:
  Tekniska nevnd metir ikki, at brúk er fyri egningarskúrinum. Bygdarráðið samtykti einmælt at takka fyri tilboðið, men siga frá, at kommunan í løtuni ikki hevur áhuga í at keypa bygningin.
- Skriv um gøtuljós á matr. nr. 457:
  Samtykt varð at gøtuljósið verður flutt skjótast gjørligt.
- Umsókn um graviloyvi á matr. nr. 128n:
  Tekniska nevnd hevur verið á staðnum. Samtykt varð einmælt at geva graviloyvi, treytað av, at eigaraviðurskiftini eru í lagi.

**Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**

- Asfaltering av túni hjá borgara:
  Samtykt varð einmælt at staðfesta avgerðina, ið borgarin fekk fráboðan um tann 19. juni 2013.

**Trivnaðarnevndin (framløga Rúni Thomsen):**

- Skriv frá útiarbeiðandi mammum viðvíkjandi verandi dagrøktarskipan:
  Samtykt varð at svara teimum, at bygdarráðið arbeiðir miðvíst fyri at byrja uppá barnagarð.

**10. Ikki almenn mál.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.30

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Magni Bertholdsen

Eyðfinn Debes Martin í Nesi Niels J. Thomsen Jóhan Eli Poulsen